Lýsingartorgið

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
✓ privatar lýsingar
✓ í mesta lagi 40 orð
✓ bert ein lutur í hvørjari lýsing
✓ hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
✓ frá fyritøkum og virkjum
✓ fleiri enn 40 orð
✓ søluvirði oman fyri 20.000 kr.

tó minst 50,- kr. + MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
50,- kr. + MVG hvørja ferð:
✓ lýsingar undir teigunum: »Dansur«, »Fundir« og »Matur«
✓ Bill. merktar

Akfør

AUDI 80
hvítur, árg. 87, vælhildin og í sera góðum standi, koyrt 132.400 til sølu fyri 50.000,-
Tlf. 211952

DAIHATSU APPLAUSE
1.6 XI, 16v, árg. 95 til sølu. Bilurin er í góðum standi, hevur júst verið til sýn, fekk ongan kross. Bilurin hevur krók.
Tlf. 424792 eftir kl. 17

DAIHATSU CHARMANT
Árg. ´87, skaða framman, motorurin er góður. Dekk á 8 felgum. Kostnaður 4.000 kr.
Tlf. 316105

DEILIR TIL TOYOTA
Corolla, 1.6 DX árg. uml. 85, hurðar, ljós, motorur o.m.a. til sølu.
Tlf. 449045 eftir kl. 17

DEKK TIL SØLU
2 stk. dekk til sølu fyri 1.000 kr. pr. stk. Dekkini eru sum nýggj. stødd 235/40 ZR - 1790 W.
Tlf. 375222

DIESEL BILUR
Ford Fiesta 1,8 diesel, árg. ´94. Powerstýring, sóltak og alu-felgir. Í sera góðum standi, til sølu fyri 72.000 kr.
Tlf. 214413 ella 217192

EIN
Suzuki DM 50 Samurai til sølu fyri 6500 kr.
Tlf. 455771

EIN REYÐUR
Nissan Sunny, bíliga til sølu. Bilurin hevur píkadekk undir og summardekk á felgu fylgja við.
Tlf. 315760

ELLISAKFAR TIL SØLU
Opel Record P2, árg. 1961, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 212322

FORD ESCORT 1,6 CL
árg. ´86 til sølu sum eykalutir.
Tlf. 317577

FORD SIERRA
15 ára gamal Ford Sierra til sølu. Koyrir væl. Eykalutir + píkadekk og vanlig dekk fylgja við. Prísuppskot á 6.000 kr.
Tlf. 317413 ella 221017

DIESEL VØRUVOGNUR
Toyota Hiace árg. 87, koyrt umleið 150.000 km. til sølu fyri 17.000 kr.
Tlf. 310998 aftaná kl. 17

FÝRA NÝGGJAR
orginalar BMW 16" alu felgur v/ nýggjum dekkum. Lágprofil týsk super dekk (spesiel til BMW), sera flottar, ring nú og keyp einar flottar felgur til BMW'in.
Tlf. 211372
millum kl. 8-9 á morgni

HONDA CIVIC 1.6
VTI, er til sølu um hóskandi boð fæst. Bilurin er sera væl hildin, hevur elspegl, -rútar, powerstýring og aircondition. 16" felgur og senkaður, hevur 160 HK.
Tlf. 447220

MAZDA 323
frá januar 1999, selist fyri 98.000,- kr. Er botnviðgjørdur, eins og nýggjur sleipikrókur fylgir við.
Tlf. 332203

MAZDA 626
2.0, árg. ´87, til sølu fyri 10.000 kr. Bilurin er sýnaður 07.01.2000.
Tlf. 422522 ella 422411

MITSUBISHI PAJERO
2.5 TD, árg. 88, el-rútar, powerstýring, hita í setrum, ca. 210.000 km, til sølu um nóg gott boð fæst.
Tlf. 281344

NISSAN BLUEBIRD
T12, 2.0 SLX, hvítur, árg. 89, hevur el. rútar, el. sóltak og centrallás, bíliga til sølu.
Tlf. 212359

NISSAN PATROL
Ein nýsýnaður Nissan Patrol 3.3 TD, stytra modellið frá 86 til sølu fyri 20.000 ella hægst bjóðandi. Og ein Nissan Patrol 3.3. TD longra modellið, við setrum aftan, til sølu fyri 18.000 kr.
Tlf. 283517

OPEL ASTRA
Ein 3 ára gamal Opel Astra 1700 Turbo diesel til sølu vegna keyp av størri bili.
Tlf. 316926
best eftir kl. 18.30

OPEL CORSA 1.4
myrkabláur, árg. 4/98, bert koyrt 23.000 km, er sum nýggjur, til sølu vegna keyp av størri bili.
Tlf. 456963

PIRELLI DEKK
4 Pirelli dekk 185-6514 til sølu. 400,- kr. pr. stk.
Tlf. 212322

SPORTFELGUR
15" fondmetal, 5 hol, passa t.d. til Toyota Camry og Carina. Felgurnar eru sum nýggjar, til sølu fyri 3.000 kr, nýprísur 4.000 kr.
Tl.f 217966
ella 447966

SPORTFELGUR
4 sportfelgur 14", passa til Peugeot, Citroen og onnur model, til sølu v/dekkum, brúkt í tríggjar mánaðir.
Tlf. 212322

TIL SØLU
Ein 5 trins gearkassi til Opel Ascona fyri 1500 kr.
Tlf. 218778

MITSUBISHI GALANT
1.8 TD til sølu sum eykalutir fyri 2500 kr.
Tlf. 422183 fartlf. 212181

TOYOTA
landcruiser, toppstykki, pumpa, o.a. til sølu.
Tlf. 449045 ella 283753
eftir kl. 17

TOYOTA CAMRY
GLI árg.´86, bert koyrt 119.539 km. Til sølu fyri 18.000 kr.
Tlf. 310300

TOYOTA CELICA 2.0
GT, Twin Cam, árg. 87, til sølu, við fylgja 16" sportfelgur + píkadekk á 15" felgum. Bilurin er hvítur og sær sera gott út! Prísur: 60.000,-. Áhugaði kunnu ringja
tlf. 314212

TOYOTA CROWN
2.8i, Super Saloon, partvíst sundurtikin, til sølu fyri 5000 kr.
Tlf. 217661

TOYOTA HI-ACE
motorur til sølu fyri sámuligan penga.
Ring 421015

TURBO
o.a. til ein Toyota 2 L motor, til sølu.
Tlf. 317413 ella 221017

VOLVO 340
árg. 86, til sølu sum eykalutir ella í heilum fyri 4000 kr.
Tlf. 333804 Guðmundur
ella 333901 eftir kl. 16

VOLVO 440 SLT
1.7i, hevur koyrt 133.000 km, til sølu. Bilurin hevur alla eykaútgerð s.s. el-rútar og -spegl, infocantral, vel og spoylarar.
Tlf. 447942

VW PASSAT
Ein gráur VW Passat, 1.8 st., árg. 89, til sølu. Koyrir gott og er í góðum standi. Hevur powerstýring.
Tlf. 315618 ella 213580

VØRUVOGNUR
Fiat Dukator 25 TD, árg. ´88, koyrir væl, er rúmligur og sær gott út. Fæst fyri sámuliga prís.
Tlf. 216600

VØRUVOGNUR
Ein Toyota Hi-ace árg. 86, koyrt 149.000 km, sýnaður jan. 2000. Sera vælhildin og í góðum standi.
Tlf. 220419 ella 374404

Amboð

ARBEIÐSSKÚRAR
til keyps og leigu.
Kaj Andreasen & Co.
Tlf. 315600
fax 318008

EIN
pappírsknívur av slagnum IDEAL til 380V, kann skera upp til 65 cm. breidd, bíliga til sølu.
Tlf. 315723

Arbeiði

24 ÁRA GAMAL
átekur sær alt fyrifallandi arbeiði, í styttri ella longri tíðarskeið.
Tlf. 315861

ALT
fyrifallandi arbeiði verður gjørt av tilkomnum manni, ið er handverkari.
Tlf. 310352

ARBEIÐI
Leita verður eftir ungum fólki at bera bløð út, á Skála, í Runavík, í Klaksvík og kring landið.
Muller & Stakksund
tlf. 321415
ella 211415

ARBEIÐI SØKIST
36 ára gamal maður søkir arbeiði. Alt hevur áhuga.
Tlf. 220295

ARBEIÐI SØKIST
26 ára gomul kvinna við HH prógvi, royndir innan reingering og børn, søkir arbeiði at byrja beinanvegin. Alt hevur áhuga. Vinarliga ringið á
tlf. 319428 eftir kl. 17

LÆRUPLÁSS
22 ára gamal drongur søkir læruplass ella arbeiði á skrivstovu. Havi HH og ymsar royndir. Vinarliga ring tlf. 443305

RØR- OG SANITET
Eg átaki mær alt rør- og sanitetarbeiði, skifti eisini ketlar.
Hans J. á Lava
Tlf. 214797 ella 314797

SVEISIARBEIÐI
Eg átaki mær alt sveisiarbeiði. Havi sertifikat í sveising.
Hans J. á Lava
Tlf. 214797 ella 314797

VIT GERA
hitaverk - sanitet - vatnleiðingar - frágrenningar - takrennur. T-rør
Tlf. 221241 ella 319782

Barnaútgerð

BARNAVOGNUR
við lift, av slagnum Brio. Grønur, 15 mðr. gamal, sær út sum nýggjur, regnslag og flugunet fylgja við, til sølu fyri 2800 kr.
Tlf. 448148

BARNAVOGNUR (SIMO)
Góður myrkabláur SIMO barnavognur, einans brúktur í eitt ár, til sølu fyri kr. 2.000,- Kann sígjjast á www.vognur.abc.fo
Tlf. 214014

BRIO COMBIVOGNUR
Myrkabláur leðurlook combivognur við leðurlook koyriposa, til sølu.
Tlf. 421680

SCANDIA KOYRISTÓLUR
Ein lítið brúktur Scandia leðurlook koyristólur við kalesju og koyriposa til sølu fyri 1.200 kr.
Tlf. 372137

TIL SØLU
2 tremmusengur við madrassu til sølu.
Tlf. 457957

TIL SØLU
Babylift v/madrassu, dýnu og pútu, bert brúkt til eitt barn, selist fyri kr. 450,-.
Gangistativ fyri kr. 100,-
Tlf. 316007

Barnaansing

BARNAANSING
Ein 19 ára gomul genta søkir at passa børnum og til lættari húsligt arbeiði.
Tlf. 447405
(Liggur best fyri á Skálafjørðinum)

VIL DU ARBEJDE
på en bondegård i Island? En dygtig pige ønskes til at passe børn på en bondegård i Island. Børnene er to og fire år gamle. På gården holder vi ko, får, heste, hunde og en kat. Løn ca: 30.000 ikr pr. måned og radningstid ca. seks måneder.
Tlf. +354 4351461
Hulda Hrönn
adr. Geirshlið, 320
Reykolt, Island
e-mail:
huldahronn@simnet.is

Bátaútgerð

SNELLUR
vit hava nakrar bíligar brútktar snellur á goymslu. Snellurnar verða seldar við garanti. Áhuga ringi
tlf. 212422

STIGFJORD 28"
til sølu. Sera væl útgjørdur. Klárur til fiskiskap.
Tlf. 444632

Bingo

BÁRUTOMBOLA
Stórt páskareggs-tombola verður leygardagin 18. mars frá kl. 9.30-13.00 og frá kl. 18.30-22.30 á Statoilstøðini. Ein ørgrynna av páskareggum, ja uml. 5-600 páskaregg.
Bygdarfelagið Báran

BINGO
verður í Framtíðini mánadagin 3. apríl og mánadagin 1. mai kl. 19.30. Onnurhvør full pláta 300 kr. onnurhvør dupult rekkja 200 kr. 15 góðir lutir á lutaseðli fyri 5 kr. seðilin.
Vágs Matmoðrafelag

GOTT BINGO
verður í Ólastovu leygardagin 18.3. kl. 16. Full pláta 400 kr. 10 vinningar á lutaseðli.
Oyndafjarðar Ítróttarfelag

GOTT BINGO
í Pállstovu hósdagin 16. mars. kl.19 Gávukort til fulla plátu. Drigið verður millum spølini. Høvuðsvinningur á lutaseðlinum vikuskiftisferð. 15 plátur 100 kr.Eykaspæl verður.
Kyndil

BINGO
verður í Havnar klubba sunnudagin 19. mars kl. 19.00.
Havnar Klubbi

HEY VÁGAFÓLK
Nú verður aftur høvi at vinna sær páskaregg. 27. mars kl. 17 verður tombola í Miðvágs skúla fyri Beitishúsinum.
Nevndin

KAGGIN
Gott páskabingo verður leygardagin 18.3. Byrjað verður kl. 15 fyri børnum og kl. 19 fyri vaksnum. Nógvir góðir vinningar m.a. før. páskaregg og páskakurvar. 15 vinningar á lutaseðlum. Eisini verður eykaspæl.
Kaggin

SUÐRINGAR
Gott páskabingo verður á Hotel Øravík, veitsluhøllin sunnudagin 26.3. kl. 16. At vinna verður m.a. 300 kr. til fulla plátu, á lutaseðli 4 gávukort á 500 kr. hálv krov, karamellir og sodavatn. Drigið verður ímillum hvørt spælið um 1 páskaregg. Bussur koyrir úr Sumba kl. 14.45, koyrt verður suður aftaná.
Sumbiar Ítróttarfelag

SUÐRINGAR
Gott bingo verður í TB-húsinum 18. mars kl. 17. Høvuðsvinningur á lutaseðli 2 x 500 kr. o.a. Bingo 300 kr. 1/2 krov aðruhvørjaferð. Tvøroyrar Bóltfelag Suðuroyingar Gott bingo verður í Roynhøllini leygardagin 18. mars kl. 17.
Sjómanskvinnuringurin

Burturm. / funnið

EASTPAK TASKA FUNNIN
Er tað nakar ið hevur mist eina Eastpak tasku, við einum jakka í. Funnin í einum bussskýli við Gundadal. Um tað er tín so ring á
tlf. 310463

EIN
mein funnin við Adventistaskúlan. Tann, ið saknar eina hestamein kann ringja tlf. 319684 ella 312664, spyr eftir Terju

LÍTIL SVARTUR
leðurpungur við einum Ruko-lykli og persónligum pappírum, mistur í Hoydølum 3.3.2000. Finningarløn verður latin.
Tlf. 312378

TANN
sum hevur funnið ein reyðan og svartan ryggsekk við millum annað eini stórari brúnari húgvu og camera í. Vinarliga ring
tlf. 422027

TANN
sum hevur funnið mína Ericsson mobiltelefon uttanfyri skúlan á Kambsdali aftaná grýludansin leygarkvøldið, vinarliga ring á tlf. 220250 ella 441447 og sig frá.
Tom

Býli

HÚS Í LEIRVÍK
til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 443388 ella 443211

HÚS TIL LEIGU
Eldri hús í Leirvík til leigu.
Tlf. 283902

ELDRI HÚS
í Ljósá til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 423459

HALDI SUMMARFRÍ Í DANMARK
Býti hús/íbúð við okkum í Tórshavn. Vit eru eini tilkomin hjún, vit hvørki roykja ella drekka og vit fara væl um. Íbúðin hjá okkum er 112 kvm., liggur mitt í Árhus. Hon hevur køk, stovu, trý verilsir, baðiverilsi og gong. Hon liggur á 2. sali, hevur elevator og er tip top moderna. Gott samband til baðistrendur og skóg. Hevur hetta tygara áhuga, so ring tlf. og fax 86 125554
ella mobil 21827606 + 21818214

HÚS ELLA ÍBÚÐ
ynskjast til leigu í Tórshavn ella á Streymoynni til einligan pápa við einari dóttir, sum ynskja at flyta heim úr Grønlandi.
Tlf. 317139

HÚS TIL SØLU
Hús í friðaligum umhvørvi í Havn til sølu um nøktandi boð fæst.
Ringið 220425 eftir kl. 18

HÚS YNSKJAST
til leigu á eystara armi á Skálafjørðinum, ella møguliga í Gøtu skjótast gjørligt.
Vinarliga ringið tlf. 221367

HØLI TIL LEIGU
til skrivstovu ella forrætning.
Tlf. 315438

ÍBÚÐ SØKIST
Tilkomin kvinna søkir íbúð, har man kann fara í bað einaferð um dagin, syngja, hoyra musikk og fáa sær eitt glas av víni, um man hevur ráð til tað og roykja. Annars fáa frið at vera menniskja.
Bill.mrk. 047790

ÍBÚÐ SØKIST Í HAVN
Friðarlig fólk sum fara væl um, søkja íbúð sum skjótast. Vinarliga ringið
tlf. 319865

ÍBÚÐ SØKIST!
Friðalig fólk við einum barni søkja íbúð í Tórshavn, pr. 1. apríl 2000, gjalda til tíðina og fara væl um.
Tlf. 281813, Eli

ÍBÚÐ YNSKIST TIL LEIGU
skjótast gjørligt, skal helst hava 2 kømur.
Tlf. 313277
eftir kl. 17, Eyðna

LEIGA SUMMARHÚS
30 min. frá Árhus, 15 min. frá Árhus luftahavn, við góða strond, til leigu. Sí www.sologstrand.dk hús nr. 53-3535 ella ring
tlf. 211861

YNSKIST
Hús/íbúð ynskist í Miðvági ella Sandavági skjótast gjørligt. Vinarliga ringið tlf. 333804 ella 333901 aftaná kl. 16, Guðmundur og Sólbjørg

Dansur

HJARNAR Í SUÐRI
Hjararnar spæla til dans í VB-húsinum leygarkvøldið 18.3.
Sumbiar Ítróttarfelag

Dýr

HØNUR
til sølu.
Tlf. 447665

6 DVØRGA-HAMSTARAUNGAR
fáast við at avheinta teir. Bert til djóravin.
Tlf. 221038

AV SERLIGUM
umstøðum lata vit ein 4 mðr. gl. hvølp til djóravin. Brúnur og hvítur, reinligur og aktar væl, undan lítlari tík.
Ring 319909
eftir kl. 17

DUNNUR
til sølu.
Tlf. 447665

DVØRGAHAMSTRARAR
til sølu fyri 40 kr. stk.
Tlf. 310226

HJÁLP
Eg eri ein genta, sum fegin vil sleppa at ríða eina ferð um vikuna. Og kann passa tað nøkurlunda.
Ring tlf. 319684 ella 312664 millum kl. 18-21, spyr eftir Terju

HJÁLP!
Eg eri ein 14 vikur gamal kettlingur, sum verði noyddur at finna eitt nýtt heim. Eg er silvurgráur, fittur, vælvandur og reinligur. Ring til mínar eigarar og tosa við tey á
tlf. 372292

HUNDAFLUTNINGSKASSI
Ein góðkendur hundaflutningskassi til sølu. Áhugað kunnu ringja
tlf. 282116

HUNDAHVØLPAR
Tveir hundahvølpar undan sera barnavinarligari tík, vera latnir djóravini.
Tlf. 310190
ella 221488

HUNDAHVØLPAR
undan Border Collie tík, ið er av sera góðum seyðahundaslag, kunnu avheintast um tríggjar vikur.
Tlf. 447610

KANIN
Ein kanin, uml. 7 mðr. gomul, fæst við at avheinta hana.
Tlf. 448375

KANINIR
2 kaninir við búri til sølu, ein hvít og ein svørt, báðar eru uml. 8. mðr.
Tlf. 311239

TIL SØLU
Undulatar og zabrafinkur.
Tlf. 314434

TIL SØLU TIL DJÓRAVIN
2 undulátar, búr við ymiskum tilhoyri og bókin um undulátar fylgja við. Alt til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 317330, Birita

TVEIR
undulátar í búri til sølu fyri 200 kr.
Tlf. 444462

UNDULÁTAR
til sølu.
Landavgur 21A
Tórshavn

Fundir

FIBROMYALGI
fundur verður í MBF-húsinum, Íslandsvegur 10, leygardagin 18. mars kl. 14.00. Á skránni er: Ymiskt.
Nevndin

HAVNAR TRAÐAR-MANNAFELAG
Ársaðalfundur felagsins verður í hølum Føroya Ríðingafelags mánadagin 20.3. kl. 19.30. Skrá smb. lógum felagsins.
Nevndin

K.S.R.
Aðalfundur verður sunnudagin 26 mars kl. 17 í Glæmuni. Skrá smb. lógum felagsins.
Nevndin

Húsarhaldstól

EITT KØLISKÁP
til sølu fyri 450 kr.
Tlf. 455443 ella 451283

FRYSTIBOKS TIL SØLU
Ein Electrolux frystiboks 500 l., sær gott út, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 448375

Innbúgv

BRÚKT
spísistovuborð og seks stólar, bíliga til sølu.
Tlf. 315395

DUPULTSONG
Góð 5 ára gomul dupultsong, 160 cm. breið, við madrassum til sølu fyri kr. 1.500,-. Kann sígjjast á www.song.abc.fo
Tlf. 214014

EIN
dupultsong, furu, 140 x 200, uttan madrassir, kann fáast fyri 200 kr.
Tlf. 316016

HIMMALSONG
Himmalsong til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 316007

HORNASOFA
Onki brúkt hornasofa til sølu vegna feilkeyp.
Tlf. 313376
ella 319223

LÍTIÐ BRÚKT
glas-sofaborð v/stálsokli/beinum, til sølu fyri kr. 1.500,-. Stødd: 80 x 140.
Tlf. 310245
eftir kl. 18

MARMORBORÐ TIL SØLU
140 x 80, hevur stálbein, fimm stólar fylgja við. Prísur: 2.000,- kr.
Tlf. 315991

MØBLAR
1 sofa og 2 stólar til sølu fyri 450 kr.
Tlf. 455443 ella 451283

SONG TIL SØLU
Góð dupultsong í lúta furu - 140 cm breið við tveimum madrassum, til sølu fyri 900 kr.
Tlf. 318657

SOVISOFA TIL SØLU
2 pers., grøn, í góðum standi, fyri 2000 kr.
Tlf. 318474

TIL SØLU
leðurstólur við fótskamli til sølu fyri 450 kr.
Tlf. 455443
ella 451283

TIL SØLU
Bestikk sett 12 persónar, Freia.
Tlf. 316016

Lutaseðlar

LIONS CLUB VÁGAR
Vinnarar á lutaseðli hjá LC-vágar, trektur á Giljanesi 5. mars 2000.

1. 1344	2. 4971
3. 4522	4. 1455
5. 7191	6. 5870
7. 6017	8. 2907
9. 7983	10. 2089
11. 1071	12. 3257
13. 299	14. 5575
15. 1459	

Tey, sum hava vunnið, sigi frá á tlf. 332966 ella 210444, LC-Vágar takkar fyri stuðulin

Pløgg

BRÚÐARKJÓLI TIL SØLU
Ráhvítur brúðarkjóli, stødd 38-40 til søluyri kr. 3.000,-
Tlf. 310772

BUFFALO STYVLAR TIL SØLU!
Nýmótans svartir, stødd 36/37 við høgum hæli. Sígjja gott út, nýprísur uml. 1.000 kr., men verða seldir fyri 500 kr.
Tlf. 317548

FØROYSK
klæðir til kvinnu stødd 36-38 ynskist.
Tlf. 215533

FØROYSK DAMUTROYGGJA
3/4 longd, opin framman,nýggj, ljósagrá, stod. 40-42, bíliga til sølu.
Tlf. 313569 e. kl. 14

GRØNUR SKÓTABÚNI
Ynskist! Er tað nakar, ið hevur ein skótabúna (KFUK) 12-14 ár at selja okkum. Vinarliga ringi sum skjótast.
Tlf. 316008

KONFIRMATIÓNSKJÓLI
Ein konfirmatiónskjóli Lilly model, str. 34 til sølu.
Tlf. 316227

SELHA SKÓGVAR TIL SØLU
Nýmótans svartir, stødd 37, við høgum botni. Lítið og einki brúktir, nýprísur 800 kr., verða seldir fyir 400 kr.
Tlf. 317548

TROYGGJA
til føroyska kvinnubúnan stødd 36-38, til sølu fyri 700 kr. Er lítið brúkt og sum nýggj. Nýprísur 1.225 kr.
Tlf. 220295

Samband

MAÐUR
seksti ára gamal ynskir samband við fitta og fyrikomandi kvinnu í hóskandi aldri.
Bill.mrk. 182793

Sjavs

SJAVSKAPPING
verður á Strondum sunnudagin 19. mars kl. 18. Leikarar millum 4 tey bestu þørini fáa steyp til ognar. Spælt verður um ein vikuskiftistúr fyri tvey til Keypmannahavnar við Atlantic Airways. Tilmelding ikki neyðug.
Strálan

SJAVSKAPPING
Tað verður nú leygardagin 18.3. kl. 15 at Føroyameistarakapping í sjavs verður í Ítróttarhøllini í Runavík. Føroya Shell stuðlar tiltakinum.
NSÍ og B68

SJAVSKAPPING
verður í LÍF-húsinum týskvøldið 14/3 kl. 18.30. Tilmelding er ikki neyðug.
LÍF

Súkklur

GENTUSÚKKLA
ca. 12 ár og eldri, bíliga til sølu.
Tlf. 316741

HONDA-SCOOTARI
X8R-S koyrt 2500 km, sera væl hildin, til sølu fyri 14.500 kr.
Tlf. 316118, fartlf. 210987

GENTUSÚKKLA
til umleið 10 ár, til sølu.
Tlf. 457770

KANLLERT YAMAHA
í góðum standi, bíliga til sølu.
Tlf. 316105

POWER RIDER
kondisúkkla, lítið brúkt, bíliga til sølu.
Tlf. 421025

YAMAHA AEROX
scootari, sum spildurnýggjur - koyrt 1200 km, til sølu.
Tlf. 310767 ella 220025

YAMAHA BUMP
CW50RSX, árg. 8/98, til sølu fyri kr. 10.000,-
Tlf. 319858

Teldur

GÓÐ FARTELDA TIL SØLU
Pentium II fartelda 4 GB harddisk, 32 MB ram. Bert 1 ár, lítið brúkt. Kr. 6.500,- kontant.
Ring 456004

NINTENDO 64
1 joystikk og 3 spøl: Mission Impossible, Golden Eye og Lamborgini til sølu fyri 1.500 kr. Vinarliga ringi eftir kl. 16.30
Tlf. 373231

PC-200
MK II Midi Keyboard controller, sum nýtt, kr. 1250.
Ring 216249 eftir kl. 17

PLAYSTATION BOOTCHIP
Ísetan av Bootchip, so tað eisini ber til hjá tær at spæla backup-kopi í tínari Playstation.
Tlf. 443189 eftir kl. 19

SPØL TIL PLAYSTATION
2 spøl til sølu G-police og Resident Evil, kostnaður 250,- pr. stk.
Tlf. 316216

SPØL TIL SØLU
Fifa 2000, Chempeonmaneger 99-00 og onnur spøl, bíliga til sølu.
Tlf. 443188

TIL SØLU
AMD K6-3 450 mhz 1500 kr., 128 MB SDRAM 1500 kr., TNT 2 Ultra grafikkort 2300 kr., 56 Kbs modem 200 kr., ljóðkort 200 kr, 15" skerm 500 kr. spyr eftir Jákup Erik.
Tlf. 315723

YNSKIST
Góð fartelda fyri max 6.000 kr.
Tlf. 320525 eftir kl. 18.30

Tónleikur

BOSS
guitar effekt prosessari GT5 til sølu. Nýprísur 7.000 kr. Boð undir 4.000 kr. ongan áhuga. Um royndav effektini ynskist
ring 221565

GOTT YAMAHA
stovuorgul, við tveimum ræðum av tangentum og taktum til sølu fyri einans 3.000 kr.
Tlf. 315122

GUITARI TIL SØLU
Ein CORT við eini EMG-mikrofon, næstan einki brúktur og er í góðum standi. Nýprísur uml. 5500 kr. til sølu fyri 3500 kr.
Tlf. 317354, eftir kl. 18, Uni

TIL SØLU
Ein el harmonika av merkinum Farfisa.
Tlf. 220447

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: undir teiginum: 1 2 3 4 5 ferðir *(set X)*

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Leikur ❑ Lutaseðlar
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út- & sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ ……

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12.00. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi

Sent hevur:

Navn: ……

Bústaður: ……

Bygd/býur: ……

Tlf.: ……

»Lýsingartorgið«
Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76,
110 Tórshavn

Til frímerki